VIÐMERKINGAR

# Rík tjóð, ið blakar burtur milliónir?

**At samgongan letur 20 mió. fara fyri skeyti er tragiskt, men hví fjølmiðlarnir lata hetta fara afturvið borðinum, er ein gáta.**

**Bill Justinussen og Jenis av Rana**





Meginpartin av várinum royndi Miðflokkurin at finna fram til, hví verandi samgonga broytti politisku avgerðina um at byggja miðnámsskúla í Vági- men allar royndir okkara vóru til fánýtis. Ístaðin fyri svar fingu vit uttanumtos, undanførslur og tøgn. Teir tríggir, sum tykjast standa aftanfyri avgerðina, løgmaður, landsstýrismaðurin í skúlamálum og sami í heilsu- og almannamálum, tykjast hava gjørt avtalu um at loyna sum mest av upplýsingum. Og avgerandi spurningar, sum ikki bert Miðflokkurin, men politikkarar sum heild, bæði úr andstøðu og samgongu, saman við fólki víða um hava fregnast eftir og spyrja, vilja teir tríggir ikki hoyra um at svara.

**Hví?**
Tá upplýsingar herfyri komu fram í fjølmiðlunum, sum vístu, at svar vóru til spurningar okkara, at landsstýrismenninir og løgmaður høvdu kunnleika, sum teir ikki bóru fram á Løgtingi, gjørdi Miðflokkurin vart við, at hesir harvið framdu greitt brot á stýrisskipan okkara. Eitt brot, sum í øðrum demokratiskum londum, og við virknum fjølmiðlum, hevði varpað teir út í myrkið.

Tá hendi bráddliga nakað. Tá var eingin trupulleiki hjá landsstýrismanninum í mentamálum at svara. Tað sigst, at fyrsta svar hansara, í útvarpinum, var ein hóttan um at draga manning Miðfloksins fyri rættin vegna ákæru okkara um, at landsstýrið hevði fjalt upplýsingar. Nú er jú eingin stuttleiki í at verða drigin fyri rættin, men kundi tað ført til, at teir settu spurningarnir vórðu svaraðir, ja so var tað prísin vert- mettu vit. So vit bíðaðu í tolni, kanska eisini av berum vana.

Viku seinni frættist meira, ikki frá ákæruvaldinum, men gjøgnum bløðini, har landsstýrismaðurin út í æsir váttar illgruna og- pástandir okkara um, at hann hevði upplýsingar í hópatali. Upplýsingar, sum hvørki vóru lagdir fram við løgtingsmálinum, ei heldur vóru brúktir at svara teimum ótaldu spurningum, sum settir vóru landsstýrismonnunum, mentamálaráðharranum íroknaðum, teir mánaðarnir, málið var viðgjørt á Løgtingi.

Í drúgvari blaðgrein vísir hann á, at hann longu 26. februar hevði tøka rúgvismikla frágreiðing frá arkitektavirki. Frágreiðing frá arkitekti, sum greitt tekur beinini undan t.d. fíggjarliga partinum av avgerðini um at flyta miðnámsskúlan og í staðin fyri byggja ellis- og umlættingarheim á økinum. Men tá tingfólk undir aðru viðgerð, gjøgnum álitið hjá andstøðutingfólki, fingu eitt lítið innlit í álvaran í uppriti arkitektavirkisins, m.a. upplýsingar um, at byggibúgvingin í porkerishaganum kann koma at kosta 12-14 mió, og at 9-10 mió longu vóru brúktar í Vági til onga nyttu, var eingin av landsstýrismonnunum ella løgmaður menn fyri at leggja sannleikan á borðið. Sannleikan um hví allar byggiætlanirnar í Suðri vórðu vendar á høvdið.

Var hetta í øðrum landi, høvdu fylgjurnar verið bráðar fyri avvarðandi landsstýrisfólk, men ikki í Føroyum. Her letur alt seg gera.

**Hví?**
Hví hættir hesin minst varni av landsstýrismonnunum sær alment fram við grein, sum avdúkar landsstýrið, váttar uppáhald Miðfloksins, og sum í øðrum londum hevði verið nýtt sum fellandi fyri teir?

Kann hugsast, at hetta torir tú, tann dagin tú kennir teg tryggan fyri teim eygum, sum vanliga eru vakin yvir okkum øðrum, eygunum hjá fjórðu statsmaktini, fjølmiðlunum?

Fólkaræði okkara er hótt, ikki bert av hesum málinum, men tíverri so mongum øðrum, sum ber á sama bógvin. Feskt dømi er, tá løgtingsmenn seinasta løgtingsdag kundu sita og atkvøða pening til egnan fyrimun, uttan at ein einasti fjølmiðil av álvara viðgjørdi málið.

Niðurstøða Miðfloksins er óbroytt. Vit hava eitt landsstýrið, sum fyri at yvirliva, nýtir hættir, sum í londum, har fólkaræði ræður, og har ein fræls pressa er virkin, høvdu verið óhugsandi.

p.s Annars rokna vit tað sum bera skemt, ella í besta føri sum eina misfatan, um landssyrismaðurin heldur, at løgtingsmenn skulu liggja og surfa á alnótini fyri at finna svar uppá teir spurningar, sum landsstýrismenn hava skyldu at svara teimum.

# Ov langir bíðilistar elva til stúran

**Sambandsflokkurin**
*Kaj Leo Johannesen*



Enn einaferð hevur eitt starvsfólk innan føroyska heilsuverkið úttalað seg um teir longu bíðilistarnar, sum eru í sambandi við sjúkraviðgerð í Føroyum. Týsdagin 14. juni hevði Útvarp Føroya samrøðu við Petur Højgaard, kommunulækna á Sandi, sum segði, at ein orsøk til longu bíðilistarnar í føroyska sjúkrahúsverkinum er, at samskiftið millum kommunulæknarnar og heilsuverkið er ikki nøktandi. Við eini betri samskipan kundi viðgerðin verið meira "streymlinjað", soleiðis at sjúklingarnir høvdu gliðið betur ígjøgnum systemið, segði hann.

Eisini segði Petur Højgaard, at tað at fólk mugu bíða eftir til dømis eini røntgenkanning í 3 - 4 mánaðar, elvir til stúran hjá sjúklingunum, sum í mongum førum eru bangnir fyri, at teimum feilar okkurt álvarsligt. Harafturat økir tað um sjúkrameldingarnar, tí fólk sleppa til dømis ikki til skips, tí tey koma ikki ígjøgnum systemið.

Fyri einum góðum mánað síðani vísti umsjónarmaðurin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Heri Ellingsgaard, á, at tað ber til at stytta bíðilistarnar í føroyska sjúkrahúsverkinum munandi eftir heilt stuttari tíð, uttan at hetta hevur stórvegis eykakostnað við sær. Hetta kundi verið gjørt á tann hátt, at sjúkrahúsini í eitt avmarkað tíðarskeið tóku skurðstovurnar í brúk nakrar tímar leygardag. Tað hevði ikki havt stórvegis eyka útreiðslur við sær, tí starvsfólkini fáa kortini løn fyri at vera tøk. Men bíðilistarnir kundu á henda hátt verið styttir munandi.

Hetta eru alt úttalilsir, sum stuðla uppskoti Sambandsfloksins um at politiski myndugleikin skal seta sær sum mál at fáa bíðilistarnar til sjúkraviðgerð í føroyska sjúkrahúsverkinum styttar. Vit hava í tí sambandi víst á, at stórur partur av útreiðslunum verður vunnin innaftur, við tað at fólk verða styttri frá arbeiði vegna sjúku.

Sitandi danska stjórnin hevur síðani hon tók við, fyri góðum trimum árum síðani, arbeitt miðvíst við at stytta bíðilistarnar til sjúkraviðgerð í Danmark. Hetta hevur verið ein sólskinssøga. Fleiri eru komin í viðgerð, bíðilistarnir eru styttir og sjúklingarnir eru nøgdir.

Hví gera vit so ikki tað sama í Føroyum - serliga um ein partur kann gerast uttan stórvegis eykakostnað?

Sambandsflokkurin ætlar at stríðast fyri, at bíðilistarnir til sjúkraviðgerð í Føroyum innan 3 - 4 ár verða styttir niður til í mesta lagi tveir mánaðar.

# Kongaliga vitjanin í Havn

**Fólk hava góðar møguleikar at fylgja teimum kongaligu á ferð teirra í Havn mánadagin. Ikki minst tá tey kongaligu vitja í Vágsbotni**



TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar Býráð*

Kl. 9 mánamorgunin leggur kongaskipið Dannebrog at á Bursatanga, og løtu seinri koma Margretha Drottning og Heindrikkur prinsur saman við krúnprinsaparinum í land, har Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Bjarni Djurholm, varaløgmaður og Heðin Mortensen, borgarstjóri, bjóða vælkomin. Eftir blómuhandan spælir Havnar Hornorkestur »Kong Christian« og Brandur Enni syngur tjóðsangin.

Tey sum annars eru við í kongaliga fylginum koma síðani í land, og fara saman við Drottningini, Heindrikki prinsi og krúnprinsaparinum at heilsa upp á føroysk og donsk embætisfólk, sum komin eru á Bursatanga at taka ímóti. Eftir móttøkuna á bryggjuni verður farið í Tinganes.

Í Tinganesi heilsa Drottningin og Heindrikkur prinsur m.a. uppá Magnus í Niðristovu Durhuus, sum í 2004 gjørdist ársins fyrstihjálpari. Farið verður síðani niðan í Løgtingið. Drottningin og Heindrikkur prinsur i bili og krúnprinsaparið til gongu.

Gingið verður gjøgnum gamla býarpartin á Reyni, har søgufrøðingarnir Erland Viberg Joensen og Guðrun Haustein greiða frá um býarpartin.

Tá vitjanin í løgtinginum er av, fara Margretha Drottning og Heindrikkur prinsur umborð aftur í Dannebrog, har tey fara at handa heiðursmerki. Meðan hetta hendir vitjar krúnprinsaparið í Dómkirkjuni og síðani á Margarinfabrikkini. Í sambandi við vitjanina á Margarinfabrikkini, sum verður kl. 11.35, verður stórt ungdóms- og tónleikatiltak uttan fyri fabrikkina.

kl. 12.00 savnast alt kongaliga fylgið í Vágsbotni. Har fer barnakór undir leiðslu av Sigrid Sivertsen at syngja. Borgarstjórahjúnini taka ímóti kongaligu gestunum, og har fara tey kongaligu at heilsa uppá býráðslimirnar. Blómur verða handaðar og borgarstjórin heldur stutta røðu.

Løtan í Vágsbotni verður helst besta høvi hjá øllum at uppliva kongaligu vitjanina. Har er gott pláss, og so er tað eisini mitt í døgurðatímanum.

Beint eftir døgurða verður vitjað í Müllers Pakkhúsi. Tá hendan vitjanin er av, fara Drottningin og Heindrikkur prinsur og krúnprinsaparið hvør sína leið, til tey eru aftur á Dannebrog kl. 17.10.

Drottningin og Heindrikkur prinsur vitja á Landssjúkrahúsinum, á Tjarnargarði og á Fornminnissavninum, hagani leiðin gongur niðan í Hoyvíkar, á økið, har kirkjan skal byggjast. Kl. 16.10 fer Drottningin at leggja grundarsteinin til nýggju Hoyvíkar Kirkju.

Á veg úr Hoyvík og út aftur á kongaskipið, verður leiðin løgd um húsini hjá Williami Heinesen.

Leiðin hjá krúnprinsaparinum gongur frá Müllerspakkhúsi og út á Dagstovnin á Hamrinum. Hagani niðan í Listaskálan, og frá Listaskálanum niðan í Mjørkadal.

Eftir vitjanina í Mjørkadali verður aftur koyrt til kongaskipið.

kl. 18.50 verður aftur farið av Dannebrog, og tá gongur leiðin niðan í Norðurlandahúsið, har skipað verður fyri tónleikaframførslu, og har eisini verður boðið til døgurða.

Úr Norðurlandahúsinum verður farið beinleiðis á kongaskipið Dannebrog, sum loysir frá bryggju kl. 23.00.